# Aðalfundur í Kommunufelagnum

**Føroya Kommunufelag hevði aðalfund um vikuskiftið. Nýggjur formaður skal veljast, nú Jacob Vestergaard, sum hevur verið formaður seinastu tvey árini, tekur við starvinum sum landsstýrismaður við fiskivinnumálum**



*Nógvir kommunustýrislimir vóru møttir á fundi leygardagin, har millum annað eldrarøkt og barnavernd vóru til viðgerðar*

*Mynd: Heri á Rógvi*

KOMMUNUTÍÐINDI
*Edvard Joensen*

Føroya Kommunufelag hevði aðalfund á Hotel Føroyum um vikuskiftið. Fríggjakvøldið vóru umboðráðslimirnir á fundi, meðan fundurin leygardagin var fyri allar kommunustýrislimir í landinum. Væl av fólki var á fundi.

Jacob Vestergaard, fráfarandi formaður í Føroya Kommunufelag, sigur, at á umborðsráðsfundinum fríggjakvøldið var formansfrágreiðing latin, eins og roknskapurin hjá felagnum var til viðgerar.

Viðgjørd vórðu aktuell mál, sum hava við kommununala fyristing at gera, eins og tosað eisini varð um slíkt, sum væntandi fer at henda í famtíðini.

Leygardagin var almennur fundir. Tað vil siga, at allir bý- og bygdarráðslimir í teimum kommunum, sum hava limaskap í Føroya Kommunufelag, høvdu atgongd til fundin.

Tann fundurin var fjølmentur, sigur Jacob Vestergaard, og tað gjørdist ein góður fundur, sigur hann.

Tosað varð nógv um mál, sum eru uppi í løtuni. Serliga eldraøkið og ikki minst nýggja barnaverndarlógin, vóru viðgjørd, sigur fráfarandi formaðurin.

Nýggja barnaverndarlógin er heilt greitt eitt mál, sum upptekur kommunalpolitikkarar kring landið sigur hann. Og fólk tóku sum heild undir við nýggju lógini, hóast rættiliga nógvar viðmerkingar eisini vóru.

Serliga tykist tað vera fíggjarliga býtið millum land og kommunur, sum kommunustýrislimir ikki eru heilt nøgdir við. Fleiri vildu halda, at teir sleppa ikki at valda, sum teimum verður álagt at gjalda, sigur Jacob Vestergaard. Lóggivið verður heilt niður í smálutir, vísir hann á, og tað tykist eftir øllum at døma summum bygdarráðslimum at vera í meira lagi.

Nú Jacob Vestergaard tekur við sum landsstýrismaður við fiskivinnumálum, skal nýggjur formaður veljast í Føroya Kommunufelag. Formaður verður valdur millum limirnar í stýrinum fyri Kommunufelagið.

Føroya Kommunufelag er skipað soleiðis, at hvørt øki í landinum, sum verður býtt eftir sýslunum, velur ein lim í stýrið. Tó er tað so, at um onkur kommuna í økinum hevur fleiri enn 1.000 íbúgvar, fær hendan kommunan egnan stýrislim, soleiðis at tað tá verða minst tveir limir fyri økið.

Soleiðis fekk Miðvágs Kommuna egnan stýrislim á fundinum um vikuskiftið, tí Miðvágs Kommuna er farin upp um 1.000 í íbúgvaratali. Marianna Simonsen varð av Miðvágs Kommunu vald í stýrið fyri Føroya Kommunufelag. Umframt umboðaðr Jóanis Nielsen úr Sandavági Vágar í stýrinum. Hann umboðar Bíggjar, Sørvágs og Sandavágs kommunur, sum allar hava færri nn 1.000 íbúgvar og tí hava ein stýrislim í felag.

Nú Miðvágs Kommuna hevur egna umboðan í stýrin um fyri føroya Kommunufelag, eru níggju stýrislimir í felagnum.

Nú Jacob Vestergaard er farin úr stýrinum í Føroya Kommunufelag, hava limakommunurnar í Suðuroy valt Onnu Djurhuus í Porkeri at umboða Suðruoyar øki í stýrinum.

Stýrislimirnir fara at velja nýggjan formann mikudagin, sigur Jacob Vestergaard. Til nýggjur formaður er valdur, er næstformaður, Jógvan Edmund á Geilini í Svínoy, virkandi formaður í Føroya Kommunufelag.



*Jacob Vestergaard, h.m, á umboðsráðsfundi saman við Poul Andreasi Joensen úr Leirvík, sum eisini er stýrislimur í Føroya Kommunufelag*

*Mynd: Heri á Rógvi*




FAROE SEAFOOD

Fiskasølusamtakið marknaðarførir eitt stórt úrval av fiskavørum við egnum merki á marknaðum í fleiri enn 30 londum. Høvuðsskrivstovan er í Tórshavn, og felagið hevur dótturfeløg í Onglandi, Fraklandi og Danmørk. Føroya Fiskasøla er størsta útflutningsfelag í Føroyum. Fiskasølusamtakið hevur dugnalig og professionel starvsfólk, ið dagliga starvast í altjóða umhvørvi.

## Avloysari fyri roknskaparfólk í barnsburðarfarloyvi

Fiskasølan søkir eftir avloysara fyri roknskaparfólk í barnsburðarfarloyvi at byrja skjótast til ber. Møguleiki er at fáa fast starv.

**Starvið**
Starvið er sera sjálvstøðugt og fevnir um roknskaparuppgávur, til dømis avgreiðslu, skráseting og uppfylging av útreiðslum í sambandi við vørukeyp, t.v.s. vøruognarar, flutningsútreiðslur, goymsluleiga og annað. Ein ella tveir dagar um vikuna verður starvast í framleiðslufelagi okkara, Fiskavirkinum í Fuglafirði. Hinar dagarnar er roknskaparfólkið á høvuðsskrivstovuni í Tórshavn.

**Umsøkjarin**
Tú ert nærlagdur og dugir væl at skipa arbeiði títt. Harumframt megnar tú at arbeiða sjálvstøðugt. Tað er ein fyrimunur at hava verið í einum líknandi starvi í fiskivinnuni áður og at hava kunnleika til Navision Financials. Tað er ein treyt, at tú dugir væl at orða teg á enskum bæði í skrift og talu.

**Vit bjóða**
Eitt avbjóðandi og mennandi starv í einum altjóða virki, har tú sleppur at samstarva við dótturfelag hjá Fiskasøluni í Føroyum og uttanlands, og onnur viðskiftafólk hjá samtakinum.

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal í seinasta lagi 25. februar 2003 sendast til:

**Føroya Fiskasøla P/F**
Postsmoga 68
110 Tórshavn
Att.: Starvsfólkadeildin

Upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Hans Michael Johannessen, roknskaparleiðara, tel. 345 345. Fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

Føroya Fiskasøla P/F • P.O. Box 68 • FO-110 Tórshavn • Tel +298 345 345 • Fax +298 345 300 • e-mail: faroe@faroe.com




# Nú skal landslækni setast til skúlabørn

**Bill Justinussen ætlar nú at seta eitt slag av barnalandslækna, sum skal kanna øll skúlabørn eina ferð árið og sum skal ráðgeva og vegleiða um heilsu hjá børnum í víðari merking**

HEILSURØKT
*Áki Bertholdsen*



*Tað er ógvuligaumráðandi, at vit fáa ein lækna, sum hevur eitt vakið eyga við viðurksiftum, sum ávirka heilsuna hjá børnum á ymsan hátt, sigur Bill Justinussen, landsstýrismaður*

Bill Justinussen, landsstýrismaður í heilsumálum, ætlar sær undir eitt veruligt átak at bøta um heilsuviðurskiftini hjá børnum.

Tað, hann ætlar at gera við at seta ein lækna, sum burturav skal hava við heilsuna hjá børnum at gera.

Hetta verður eitt slag av barnalandslækna, sum einaferð um árið skal ferðast runt landið at kanna øll skúlabørn í Føroyum í fyrsta og áttanda flokki.

Harumramt skal hann ráðgeva og vegleiða um heilsu hjá børnum.

Hann sigur, at hann fer at leggja uppskot fyri Løgtingið um skúlalæknaskipan, áðrenn freistin at leggja uppskot fram í hesi tingsetuni er úti 5. mars.

Hann heldur at hetta er eitt øki, sum er forsømt í Føroyum og at tað leingi hevur verið eitt hjartamál hjá miðflokkinum at fáa skúlalæknaviðurskiftini í rættlag.

Tað er ógvuliga ymiskt, hvussu skúlabørn eru fyri á hesum øki.

- Summastaðni eru skúlalæknar, aðrastaðni eru ongir og vit kunnu ikki vera bekent at børnini skulu hava so ymisk tilboð á hesum øki, heldur Bill Justinussen.

Hann sigur, at verður ein landsumfatandi skúlalækni settur, fer hann við tíðini at uppbyggja sær eina serfrøði á økinum, sum fer at gera hann ógvuliga væl skikkaðan at ráðgeva øðrum fólkum í heilsuverkinum, skúlaverkinum, foreldrum, sosialum myndugleikum o.s.fr, um viðurskifti hjá børnum

- Hetta verður ein lækni, sum skal fylgja gjølliga við børnum og ungum. Hann skal hava eitt vakið eyga við tí, sum er uppi í tíðini og siga sína hugsan um tað, sum, kann ávirka viðurskiftini hjá børnum viðurskifti.

Hann kann eisini gera og skipa fyri kanningum og at útvega hagtøl fyri ymisk viðurskiftum, sum hava við skúlabørn at gera og sostatt kemur hann ikki minst at fáa týdning í tí fyribyrgjandi arbeiðnum.

# Smyril aftur í sigling í kvøld

**Tað er við blandaðum kenslum, at fólk taka ímóti Smyrli aftur, tí nógv halda, at avloysaraskipið hevur roynst betri**

SUÐUROYARSIGLING
*Áki Bertholdsen*



*Í kvøld verður Smyril aftur settur í siglingina ímillum Havnina og Suðuroynna og St Ola fer aftur landinum og Strandferðslan roynir nú at fáa reiðaran at góðtaka, at leigumálið verður broytt, so at hon sleppur undan at betala ein part av leiguni*

**Suðuroy:** Tá ið St. Ola loysir av Drelnesi í morgun, verður hetta seinasta ferðin hjá honum ímillum Suðuroynna og Havnina, í hvussu so er á hesum sinni.

Strandferðslan hevur mangan fingið áoyringar fyri at hava havt ov vánalig avloysaraskip, tá ið Smyril hevur veirð í dokk, men hesuferð má ásannast, at hon hevur skotið papakeykin.

St. Ola hevur nevniliga roynst so væl, at tey eru mong, sum halda, at tað hevði verið líka frægt at latið Smyril verið og havt estlendsku ferjuna. Har er ógvuliga rúmsátt og nossligt umborð á St. Ola og hartil er hon sera sjógóð. Einasta lítla minus hevur verið, at hon hevur nakrar fáar minuttir longri um ferðina enn Smyril hevur.

Men uppundir vikuskiftið kom Smyril aftur til lands, eftir at hava verið í dokk í Danmark í ein slakan mánað.

– Um vikuskiftið hava tey vaskað upp og niður og gjørt hann kláran at seta í sigling aftur, sigur Poul Jákup Thomsen á Strandferðsluni.

Tað er hann nú, men nú skal fyrst lógarkravd bjargingarvenjing gerast, áðrenn hann kann setast í sigling aftur.

Tann venjingin verður í dag og tá skulu allar manningar vera við og tí er neyðugt at strika dagtúrinum í dag av Havnini til Suðuroyar og úr Suðuroy til Havnar.

Men so verður tað Smyril, sum tekur siglingina uppaftur og hann fer fyrsta túrin av Havnini í kvøld klokkan 19.

Poul Jákup Thomsen sigur, at nú Smyril hevur verið í dokk, er nógv gjørt við hann. Tað, sum hevur størstan áhuga hjá ferðafólki, er uttan iva, at stabilisatorarnir eru gjørdir aftur, so at teir nú halda betri. Men annars er eitt sindur av stáli skift, umframt at ymiskt maskinarí er eftirkannað o.s.fr.

## St. Ola av landinum

Sostatt fer St Ola nú av aftur landinum. Tað fer hon um nakrar dagar, tí fyrst skal onkur lítil skaði á skipssíðuni umvælast.

Tá ið Strandferðslan leigaði St. Ola, vildi Estlendski reiðarin ikki góðtaka eitt leigumál, sum vardi styttri enn 75 dagar.

Men Strandferðslan hevur ikki brúk fyri skipinum í meiri enn helvtina av tíðini og Poul Jákup Thomsen sigur, at roynt verður nú at fáa útleigaran at góðtaka, at leigumálið verður broytt, so at Strandferðslan sleppur undan at gjalda fulla leigu.

Enn er óvist, um tað fer at eydnast, men skilligt, er, at tað kann verða nógvur peningur at spara, tí St. Ola kostar góðar 50.000 krónur um dagin. Tilsamans táttar leigumálið tískil í fýra milliónir, so eydnast tað at fáa estlendska reiðaran at slaka, er tað skjótt, at Strandferðslan sparir eina milliónupphædd og tað hevur stóran týdning fyri stovnin.